# Løgreglan kannar eldin við Landavegin

**Tvey fólk vóru í húsunum, tá ið eldur kom í. Tey vórðu innløgd á Landssjúkrahúsið í eitt samdøgur fyri møguliga roykeitran**

ELDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Páskamorgun klokkan 05.31 varð boðað frá, at roykur stóð úr einum sethúsum á Landsvegi 25 í Havn, og klokkan 05.53 fekk løgreglan fráboðan um, at sjálvur eldurin var bastur.

Tað var ein maður, sum koyrdi framvið í einum hýrivogni, ið varnaðist roykin. Farið varð á dyrnar, og tað vísti seg, at tvey fólk vóru í húsunum. Tíbetur eydnaðist teimum at fáa tey út úr húsunum, áðrenn veruligur mansskaði stóðst av eldi og royki.

Løgreglan í Havn sigur, at tey bæði – ein maður og ein kona – vórðu flutt á Landssjúkrahúsið, har tey vóru til eftirlit fyri møguliga roykeitran í eitt samdøgur. Tey vóru hampiliga væl fyri, men vóru kortini merkt av roykinum, tá ið læknin kom á staðið.



*Páskamorgun kom eldur í hesi húsini við Landavegin. Lukkutíð varnaðist ein ferðandi roykin og syrgdi fyri, at tey, sum inni vóru, fingust út, áðrenn ov seint var*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Málið kannað

Løgreglan sigur, at enn ov tíðliga at siga, hvør orsøkin var til eldin, men málið verður nú gjølligari kannað.

– Enn kunnu vit einki siga um, hvørt hetta var eitt hendiligt óhapp ella ósketni. Tað fara kanningarnar væntandi at vísa, sigur Jón Karlson á Politistøðini í Havn.

Sum skilst, fingu húsini við Landavegin stóran skaða av eldi, royki og vatni.

## Útflutningur til privata nýtslu

**Føroyingar hava loyvi at hava mat við sær til Danmarkar – antin í viðføri ella sent við pakka, men ávísar reglur eru galdandi fyri hesum útflutningi**

ÚTFLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur sent út kunningarskriv, har víst verður á, hvørjar reglur eru galdandi við útflutningi av matvørum til Danmarkar til privata nýtslu. Hetta ger stovnurin, eftir at reglurnar vórðu broyttar í fjør.

Sambært ES-reglunum hava føroyingar loyvi at innflyta til privata nýtslu í Danmark – antin í viðføri ella sent við pakka –

- Fisk og fiskavøru, íroknað eitt nú turran og ræstan fisk, í mesta lagi 5 kilo.
- Seyða- og neytakjøt og aðra matvøru, í mesta lagi 5 kilo.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sigur, at samsending av mati er loyvd; tað merkir, at loyvt er at senda fleiri pakkar til sama bústað.

Treytirnar eru –

- at váttan fylgir pakkanum, har navn og bústaður á øllum móttakarunum stendur á
- at hvør pakki í mesta lagi vigar 5 kilo
- at maturin er til egna nýtslu.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sigur, at tá ið talan er um útflutning til onnur ES lond enn Danmark, hava føroyingar ikki loyvi at taka kjøtvørur við sær, ei heldur senda tær í pakka.

– Best er at venda sær til myndugleikan í viðkomandi landi og spyrja um reglurnar, um tú ætlar tær at hava mat við, sigur Heilsufrøðiliga Starvsstovan í kunningarskrivinum.

# Tey fyrstu nøvnini á Listastevnuni avdúkað

**Á tíðindafundi í Norðurlandahúsinum týsmorgunin vórðu tey fyrstu nøvnini á Listastevnuni 2005 avdúkað. Hesi eru Barbara Hendricks, Aurelia's Oratorio og Rúni og Susanne Brattaberg saman við Føroya Symfoniorkestri og Tarira**

LISTASTEVNAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Barbara Hendricks er ein av teimum mest vælumtóktu og fjølbroyttu listafólkunum í tónleikaheiminum í dag. Hon hevur bæði sungið opera, jazz og annan meiri fólksligan tónleik.

Enn er skráin fyri konsertina hjá Barbaru á Listastevnuni ikki endaliga fastløgd, men hon fer ætlandi at syngja týskar Lieder. Konsertin hjá henni verður 9. august.

Í 2003 hevði Listastevnan vitjan av dóttir Charles Chaplin, Victoriu Chaplin og manni hennara, Jean-Babtiste Thierrée, við »Le cirque invisible« – tí ósjónliga sirkussinum. Hetta var ein sera væleydnað framsýning.

Í ár kemur so abbadóttir Chaplin, Aurélia Thierrée, higar við framførsluni, »Aurélia's Oratoriu«, og hesaferð er mamma hennara, Victoria Chaplin, við sum leikstjóri.

Henda framførslan hevur eisini fingið eitt ótal av góðum ummælum í øllum teimum londum, tær hava vitjað við »Aurélia's Oratoriu«.

Framførslan verður 5. og 6. august.

Rúni Brattaberg og konan, Susanne Brattaberg, verða eisini við á Listastevnuni í ár.

Sjálvur hevur Rúni luttikið áður, men hesaferð fer hann at hava konsert saman við konu síni og Føroya Synfoniorkestri, sum verður stjórnað av Benny Wilkinson, umframt kórinum, Tarira.

Susanne er fødd í Týsklandi og hevur fingið frálæru í operasangi á Peter Kornelius Konservatoriinum í Mainz í Týsklandi og á tí Evropeiska Operastudiinum í Balchik í Bulgariu.

Konsertin við Rúna og Súsonnu saman við orkestri og kóri verður á Listastevnuni 11. august.




*Oddva Nattestad, samskipari av Listastevnu Føroya, er boðin á listastevnu á Tasmaniu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Til Tasmaniu

Í døgunum, 1.-10. apríl í ár, verður listastevna á Tasmaniu – Ten Days on the Island.

Í samband við hesa stevnu, er samskiparin av Listastevnu Føroya, Oddvá Nattestad, boðin at verða gestur á stevnuni á Tasmaniu.

Við sær í skjáttuni til fjarskotna landið hevur Oddvá Nattestad hópin av fløgum, dvd, myndlistabókum, myndakalendarum, tilfar frá Ferðaráðnum, listastevnufaldarar og annað tilfar.

Marknaðarsamskipari fyri Listastevnu Føroya er Elin Hentze.

# 45 ára gamal vestmenningur druknaður

VANLUKKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um 9-tíðina páskamorgun fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at ein maður fleyt á vánni í Vestmanna. Tað var onkur av manningini á einum russiskum skipi, sum liggur á Vestmanna, ið bað vestmenningar boða løgregluni frá hesum.

Bæði løgregla, lækni og fólk frá bjargingarfelagnum fóru á staðið, men tað vísti seg, at maðurin var druknaður.

Løgreglan heldur alt benda á, at maðurin hevur verið áhaldsin og er dottin á sjógv.

– Vit hava fingið at vita, at vestmenningurin, sum var 45 ára gamalur, hevði eftirlit við onkrum av trolarunum í Vestmanna, sigur Jón Karlson.

Tá ið Sosialurin tosaði við løgregluna týsmorgunin, hevði líksýn ikki verið.

– Tað framgongur ikki, at maðurin hevur verið saknaður, men vit vita ikki í løtuni, hvussu leingi hann hevur verið deyður, áðrenn hann varð funnin.

Løgreglan sigur, at hóast einki bendir á, at nakað kriminelt er tengt at hesum málinum, so verður vanlukkan kannað.

– Vit vilja altíð hava at vita, nær ein slíkur persónur seinast er sæddur, hvørjum hann var saman við, og hvussu støðan annars var.

KOYRIKORT
Nýtt teoriskeið byrjar mánadagin 4.apríl
KOYRISKÚLIN
v/Árna Andreasen
Telefon: 222470 & 318779